# Nøvn

## Føðingar



*9. apríl fekk Villiam Marius ein lítlan beiggja, sum eitur Jónatan. Hann vigaði 4000 gram og var 56 cm langur. Foreldrini eru Sóley og Tór Arni Samuelsen, Tórshavn*

19. mars fingu Evelinita og Páll Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2800 gr.

24. mars fingu Birgit og Janus Thomsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3100 gr.

24. mars fingu Maikin Isholm Simonsen, Keypmannahavn, og Per Højgaard, Tórshavn, ein son. Hann vigaði 3970 gr og var 53 cm langur.

28. mars fingu Natasha Schantz Johnsson og Michael Johnsson í Sig í Danmark eina dóttur. Hon eitur Josefine.

3. apríl fingu Ann og Adrian Stauss, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3200 gr.

8. apríl fingu Petra Juul Johannesen og Dánial G. Nolsøe, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4100 gr.

10. apríl fingu Vanja Bjarnadóttir og Leif Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3320 gr.

12. apríl fingu Erla og Dánjal í Húsinum, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 58 cm long og vigaði 5310 gr.

## Merkisdagar

### 70 ára føðingardagur

Leygardagin 24. apríl verður Solveig Nolsøe Johansen 70 ár. Opið hús verður leygardagin 24. apríl í Jómsborg frá kl. 14 til kl 18. Øll eru vælkomin.

### 75 ára føðingardagur

Fríggjadagin hin 16. apríl fyllir Helena í Hoyvík, Tórshavn, 75 ár. Tey, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við henni, eru vælkomin í Losjuna á Tinghúsvegi frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 80 ára føðingardagur

Tann 19. apríl fyllir Merry Bertholdsen í Vági, 80 ár. Tey sum vilja hátíðarhalda dagin saman við henni, eru vælkomin í Billiardhúsið, har dagurin verður hildin leygarkvøldið 24. apríl kl. 19

### 95 ára føðingardagur

Leygardagin 17. apríl fyllir Amanda Joensen, Vatnsoyrar 95 ár. Tey ið ynskja at gleða hana eru vælkomin á Hotel Vágar millum kl. 15.30 og kl. 18. Um kvøldið verður hon saman við familjuni.


# Deildarleiðari til stjórnarskrivstovuna

www.torshavn.fo

**Nýtt starv sum deildarleiðari á stjórnarskrivstovuni í Tórshavnar kommunu er leyst at søkja.**

**STJÓRNARSKRIVSTOVAN**
Stjórnarskrivstovan er bygnaðarliga undir kommunustjóranum. Á stjórnarskrivstovuni starvast, umframt leiðaran, 7 fólk.

**VIRKISØKIÐ HJÁ STJÓRNARSKRIVSTOVUNI ER Í TVEIMUM:**
Stjórnarskrivstovan samskipar virksemið hjá borgarstjóranum, kommunustjóranum og fyrisitingarstjórum kommununar mótvegis politiska myndugleikanum, viðskiftafólki og umsitingini.

Stjórnarskrivstovan er í hesum sambandi móttøkan í ráðhúsinum og skrivstova hjá stjórunum, og fyrireikar fundir, vitjanir, hátíðarhald og tiltøk, sum kommunan skipar fyri ella er partur av.

Stjórnarskrivstovan hevur eisini kunningarvirksemi kommununnar um hendi, herundir ábyrgd av heimasíðu, intraneti og útgávu- og lýsingavirksemi kommununar. Stjórnarskrivstovan hevur ráðgevandi leiklut í mun til samskifti við viðskiftafólk og fjølmiðlar.

**ÚTBÚGVING OG ROYNDIR**
Vit ímynda okkum ein persón við hóskandi útbúgving innan tænastuvinnu, fyriskipan ella samskiftisøkið. Umsøkjari við royndum innan eitt ella fleiri av hesum økjum hevur fyrimun. Umsøkjari skal harumframt duga føroykst, norðurlendskt og enskt mál í skrift og talu.

**HØVUÐSUPPGÁVUR**
Deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni fær ábyrgd av at leiða stjórnarskrivstovuna, so hon virkar á høgum tænastustøði mótvegis borgarum, politiska myndugleikanum og stjórum kommununar. Í hesum sambandi hevur deildarleiðarin ábyrgd av at menna starvsfólk og fyrisiting til støðugt broyttar tíðir og avbjóðingar og tryggja, at stjórnarskrivstovan virkar sum ein eind.

Deildarleiðarin skal fyrisita og fyrireika samstarv og samskifti við vinar- og samstarvsbýir, fyrireika luttøku á ráðstevnum og messum, og fyriskipa kommununar leiklut í sambandi við tey tiltøk sum kommunan stendur fyri.

Deildarleiðarin skal skipa fyri kunningarvirksemi kommununar og tryggja, at heimasíða, intranet og útgávu- og lýsingarvirksemi kommununar eru fakliga og fíggjarliga dygg, umframt at øll kunning um kommununa er neyv og á høgum støði.

**SETANARVIÐURSKIFTI**
Starvið er fulla tíð og lønt sambært tænastumannasáttmálanum í 35. lønarflokki, uttan tó at vera tænastumannastarv. Ella sambært samsvarandi áseting í avvarðandi sáttmála.

**UMSÓKN**
Umsókn saman við prógvum, viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 4. mai 2010 kl. 12.00. Merkið umsóknina „Deildarleiðari til stjórnarskrivstovuna".

**MEIRA FÆST AT VITA**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Ingibjørg Berg, kommunustjóra á telefon 302010.

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER HØVUÐSSTAÐARKOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava ein nútímans leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA